## Bispaval í dag



Kirkjumálaráðið hevur í dag útskrivað bispaval í Føroyum. Nýggjur bispur skal finnast eftir Hans Jacob Joensen, sum eftir egnum ynski gevst síðst í novembur. Valevnini skulu øll vera tilnevnd og góðtikin við undirskrift frá minst hálvthundrað fólkum við atkvøðurætti. Atkvøðutilfarið verður sent heim til hús teirra, ið hava valrætt. Sjálv bispavígslan fer fram í dómkirkjuni í Havn sunnudagin 25. novembur 2007.07.16

## MFS skipar fyri kjakkvøldi

Komandi mikukvøld fer MFS, Meginfelag Føroyskra Studenta, at skipa fyri kjakkvøldi. Kjakast verður um hølisumstøðurnar og manglandi lestrarumhvørvið hjá teimum lesandi á okkara hægsta útbúgvingarstovni, Fróðskaparsetrinum. Á skránni vera framløgur og síðan alment kjak. Framløguhaldarar eru Rúni Rasmussen, samfelagsfrøðingur, fyrrverandi skrivari í Stjórnarskipanarnevndini og deildarleiðari á Almannastovuni, Durita L. Jóansdóttir og Rúna Jacobsen lesandi á setrinum og Jóan Pauli Joensen rektari á Fróðskaparsetri Føroya. Trubadururin Jákup Dam syngur og spælir áðrenn tiltakið byrjar, sum verður í Miðlahúsinum mikukvøldið 18. juli kl. 19.30.

# Bygdarfólk skulu gjalda skatt í Havn

**- Heldur ágangurin ímóti okkum fram, mugu vit eisini umhugsa at krevja, at tey bygdafólk, sum arbeiða í Havn eisini gjalda skatt í Havn, sigur borgarstjórin**

ÚTJAVNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú kann tað henda, at Tórshavnar Býráð fer at krevja, at tey bygdafólk, sum arbeiða í Havnini, eisini skulu betala skatt í Havn.

Tað sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Hann kallar tað, sum fer fram íløtuni, fyri ágang ímóti Havnini og tað ætlar hann ikki skal standa ósvarað.

- Heldur hesin ágangurin ímóti Havnini fram, mugu vit í Tórshavnar Býráð umhugsa, hvørji móttrekk vit kunnu hava.

Serliga misnøgdur er hann um ætlanina um at seta eina kommunala útjavningarskipan í verk, har tað líkasum liggur í kortunum, at tað er Havnin, sum skal betala til aðrar kommunur í landinum.

Tað er landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum hevur reist spurningin um eina kommunala útjavningarskipan og hesum tekur Føroya Kommunufelag fult undir við.

Føroya Kommunufelag umboðar 27 kommunur, sum fevna um 1/3 av fólkatalinum.

Men borgarstjórin í høvuðsstaðnum vil ikki hoyra talan um eina kommunala útjavningarskipan.

Hann heldur fer ikki at góðtaka, at Havnin nú skal mjólkast og sostatt revsast fyri at hava ført ein ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk, sum hevur ført við sær, at øll skuld er goldin.

Hann heldur eisini, at bygdirnar runt um í Havnini njóta eisini gott av Havnini.

Í hesum sambandi vísir hann á øll bygdafólkini, sum arbeiða í Havn.

- Veruleikin er, at bygdarfólk fáa 1/3 av øllum lønarútgjaldingum í Tórshavnar Kommunu. Sostatt er veruleikin eisini tann, at 1/3 av øllum skattakrónum av lønum, sum eru forvunnar í Havn, enda í kommunukassunum á bygd.

Hann sigur, at hesum hava tey í Tórshavnar Kommunu als onki havt ímóti.

- Vit hava hildið, at tað er bara positivt, at bygdafólk koma til Havnar at arbeiða.

Hann vísir eisini á, at tað er ikki ókeypis fyri Tórshavnar Kommunu at nógv bygdafólk koma til Havnar at arbeiða hvønn dag. Eitt nú slítir tað vegirnar illa og tað eru útreiðslur, sum Tórshavnar Kommuna ber einsamøll.

Men verður tað nú kravt, at vit eisini skulu betala í ein kommunalan útjavningargrunn, taki eg hetta sum ágang ímóti okkum.

- Og so kann tað koma hartil, at vit mugu umhugsa at krevja, at fólk betala skatt í teimum kommunum, har tey arbeiða.

- Hetta merkir so eisini, at talan kann vera um, at vit fara at krevja, at tey hundraðtals ella túsundtals bygdafólkini, sum hvønn einasta dag koma til Havnar at arbeiða, eisini skulu betala kommunuskatt í Tórshavnar Kommunu, sigur Heðin Mortensen.

Limirnir í Kommunusamskipan Føroya eru Tórshavn, Klaksvík, Runavík, Fuglafjørður, Vágur, Tvøroyri og Sandur og tær umboða 2/3 av fólkatalinum.



*Heðin Mortensen kallar tað, sum fer fram, fyri ágang ímóti Havnini og heldur hetta fram, má Tórshavnar Býráð umhugsa, hvørji móttrekk, hon kann hava, sigur hann*

# Kjakkvøld um umstøður teirra lesandi í Føroyum

ÚTBÚGVING
*Tíðindaskriv*

MFS skipar fyri kjakkvøldi í Miðlahúsinum mikukvøldið 18. juli kl. 19.30.

- Vit fara at kjakast um vánaligu hølisumstøðurnar og manglandi lestrarumhvørvið hjá teimum lesandi á okkara hægsta útbúgvingarstovni Fróðskaparsetrinum. Vit spyrja, hví sømdirnar hjá okkara universiteti ikki eru vorðnar stórvegis betur síðan Fróðskaparsetrið varð stovnað í 1965 og síðan miðfyrisitingin varð umskipað í ráð - eitt nú Mentamálaráðið, sum hevur ábyrgdina av okkara universiteti. Eisini spyrja vit, hví sømdirnar ikki tykjast at fara at verða betur, eftirsum okkara universitet heldur ikki í ár fekk størri játtan á fíggjarlógini. Eru vánaligu umstøðurnar grundaðar á, at politiska valdið ikki hevur havt nakra heildarætlan við setrinum og ongan áhuga hevur í setrinum, er tað sostatt politikararnir og Mentamálaráðið, sum hava ábyrgdina? Er tað kanska heldur í setursleiðsluni at ábyrgdin skal finnast, ella eru tað studentarnir, sum ikki gera nóg nógv vart við seg?

Soleiðis spyr Meginfelag Føroyskra Studenta í tíðindaskrivi.

- Hvørjir eru ábyrgdararnir, tá tað ræður um at menna eitt universitet. First nøkur haldbar loyst upp á hølistrupulleikarnar og sum heild menningina av føroyska universitetinum, sum hevur staðið í stað í mong ár. Er tað yvirhøvur tørvur á einum góðum lestrarumhvørvi og einum universiteti í Føroyum og kann okkara lítla samfelag yvirhøvur megna at reka eitt universitet.

Á skránni vera framløgur og síðan alment kjak. Framløguhaldarar eru Rúni Rasmussen, samfelagsfrøðingur, fyrrverandi skrivari í Stjórnarskipanarnevndini og deildarleiðari á Almannastovuni, Durita L. Jóansdóttir og Rúna Jacobsen lesandi á setrinum og Jóan Pauli Joensen rektari á Fróðskaparsetri Føroya. Trubadururin Jákup Dam syngur og spælir áðrenn tiltakið byrjar.

- Øll eru vælkomin og allir politiskir flokkar eru bjóðaðir til tiltakið, siga tey frá MFS.